## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# DÝRASTA LANDIÐ Í EVROPA




Tað er ikki hissini met, sum vit seta í nýggju kanningini hjá Hera á Rógvi, búskaparfrøðingi, sum vit almannakunngera í blaðnum í dag: Føroyar er dýrasta landið í øllum Evropa at liva í - og keypiorkan hjá okkum er 14 prosent lægri enn til dømis í Danmark.

Úrslitið er rættiliga hugvekjandi. At Danmark er eitt av dýrastu londum at liva í hevur leingi verið kent. Men at Føroya skulu vera so nógv dýrari at liva í, tað kemur kanska óvart. Men kanningin staðfestir, at tað ikki eru høg avgjøld, tollur og flutningsútreiðslur, sum eru orsøkin til høgu prísirnar. Nei orsøkin er sambært kannigini hjá Hera á Rógvi tann, at vit hava so lítla kapping á nøgvum avgerandi økjum.

Nógv viðurskifti í Føroyum er merkt av, at vit hava ein, tveir, ella nakrar heilt fáar veitarar á økinum. Hetta er eisini galdandi fyri viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri brúkaran. Tað førir við sær, at kappingin verður ov lítil, og tað førir so aftur til hægri prísir enn neyðugt. Sambært kanningini fáa handilsfólkini heldur ikki skuldina fyri høgu prísirnar, men staðfest verður tann sannroynd, at monopol og duopol føra til eitt lakari útboð av vørum og tænastum og hægri prísir. Og tað eru nógv tekin um, at hetta er støðan í Føroyum. Marknaðarstøðan, sum er í Føroyum, elvir til, at prísirnir verða hægri enn teir høvdu verið undir vanligum kappingarumstøðum.

Politiska skipanin átti at verið meira tilvitað um slíkt, sum tildømis kostnaðarstøðið í landinum. Men hetta hevur ikki serliga høga raðfesting millum politikarar.

Í Føroyum mangla vit hagtøl og kanningar í hópatal – hetta eru so grundleggjandi amboð, sum vit eiga at hava til tess at verða før fyri at stýra landinum. Tað er sjálvandi áhugavert, at ein einstakur persónur tekur stig til slíka kanning, men kann politiska skipanin vera bekent við ikki at vita slíkt?

Men hetta kanningarúrslitið er ein stór avbjóðing fyri eitt samfelag. Tí vit kunnu ikki liva við at at vera dýrasta landið í Evropa. Hetta skal broytast. Vit skulu hava teir vinnukarmar, sum fremja bestu kappingina, og vit skulu eisini hava nógv betri hagtøl og kanningar, sum eru grundleggjandi amboð fyri at stýra einum samfelag.

Vónandi kann hendan kanningin elva til slíkt kjak - og kanska fáa eina nýggja dimensjón inn í føroyskan politikk.

**» Hagtøl og kanningar eru neyðug politisk amboð**



## Leitar eftir nakinmodellum

Hans Fróði Hansen leitar í hesum døgum eftir kvinnum, sum hava hug at verða við í lýsingarherferðum fyri rakikremið Below Your Belt. Hetta rakikrem er gjørt til at raka sær við í neðra, og lýsingarnar, sum nú skulu gerast, skulu verða við naknum konufólki.

– Við at verða nakinmodell fyri BYB verður tú eitt ikon í heimunum, verður sagt í eini lýsing eftir nakinmodelum til eitt luksus merki.

Sagt verður, at nakinmyndirnar varierað frá tí delikata til tað meira víðgongda, men myndatøkurnar verða treytaðar av, hvat modellin kennir seg trygga við.

## Bussleiðin nýggjar bussar

Tórshavnar býráð samtykti á fundi mikukvøldið, at trý feløg kunnu bjóða upp á bussleiðina í Tórshavnar kommunu.

Tá ið lýst varð eftir arbeiðstakarum til at reka bussleiðina komandi árini, bjóðaðu fimm fyritøkur seg fram, men bara tríggjar teirra vóru góðkendar.

Feløgini eru Sp/f Gundurs Bussar, Stig Thomassen og Hans J. Kollslíð vegna eitt partafelag undir stovnan og P/F Mouritsens Bussar.

Bara eitt av hesum feløgunum fær alla koyringina.

Samstundis hevur býráðið samtykt nakrar broytingar i bussleiðini.

Sáttmálaskeiðið verður sjey ár.

Eitt krav verður, at bussarnir við sáttmálabyrjan skulu vera í mesta lagi tvey ára gamlir.



Koyrast skal tríggjar ferðir um tíman, frá umleið kl. 7.30 til umleið kl. 17.00.

Koyrast skal leygardag frá kl. 10.00 til kl. 16.00. Sunnudagar og halgidagar verður framvegis ikki koyrt.

Tímin fyri midnátt verður spardur burtur.

Ætlanin var, at nýggja koyriskipanin verður sett í gildi 1. oktober, men skotbráið er ov stutt, og tí verður galdandi sáttmáli longdur til árslok.

*randi@sosialurin.fo*



**» Skaðafróur Edmund**

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 10



**» Stættastríð í alføgrum blóma**

SÓLMUNDUR JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 11




## Spentur sum ein konfirmantur

Nýggi hjálparvenjarin á føroyska fótbóltslandsliðnum gleðir seg sum eitt barn til at sleppa til Føroya at starvast saman við Brian Kerr. Johnny McDonnell sigur við Irish Times, at bara tankin um nýggju uppgávuna ger hann ovurspentan.

– Eg havi ikki verið so spentur, síðani eg fekk konfirmatiónspengarnar, sigur McDonnell við blaðið.

46 ára gamli írski hjálparvenjarin skal fyribils starvast fyri FSF restina av hesum árinum.

– Eg skal verða við teir sjey til tíggju dagarnar rundan um landsdystirnar, og tað er ein stórur møguleiki fyri meg at arbeiða í eini altjóða kapping. Eg klári næstan ikki bíða eftir at sleppa í gongd, sigur McDonnell.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*